DAGSINS MEINING

Ein læripeningur

Í samband við ambassadørvitjanina herfyri kom formaður Javnaðarfloksins sær í eina sera óhepna støðu.

Øll kunnu vit vera á einum máli um, at um veljarans umboð í almennum ørindum vísa óhóskandi atburð og til dømis sovna ávirkað í hesum ørindum, so er tað stak óheppið.

Formaður Javnaðarfloksins var sjálvur í Sjónvarpinum og greiddi frá um hendingina og bað alment um umbering. Tað fer einki av einum persóni, um hann biður um umbering – tvørturímóti. Tað er ongantíð lætt at viðganga egnar feilir og biðja um umbering, men tað er alla æru vert, at Jóannes Eidesgaard ger hetta. Farið er farið, og gjørd gerð fær onga vend, so man kann akkurát tað sama leggja øll kort á borðið.

Tað er alt ov vanligt í Føroyum, at fólk ikki vilja viðganga feilir, tí tað verður sæð sum ein fallittfráboðan. Einki er meira skeivt enn tað. Tað hevði verið nógv meira hóskandi, um t.d. frákoyrdir landsstýrimenn, ið hava gjørt feilir, høvdu viðginið hesar, men so plagar ikki at verða í Føroyum. Úrslitið er, at fólk taka støðu flokspolitiskt til annars klokkuklár mál.

Hví føroyingar hava so ilt við at viðganga feilir og biða um umbering vita vit ikki, men kanska hevur tað okkurt at gera við, at so stórur partur av fólkinum eru "feilfrí".

Málið um formann javnaðarfloksins er púra klárt. Øll – eisini høvuðspersónurin sjálvur – eru á einum máli um, at slíkt er stak óheppið, og ikki eigur at endurtaka seg. Javnaðarflokkurin hevur eina greiða støðu til rúsdrekka og tingarbeiði, og er tað upp til flokkin at gera, hvat flokkurin metir er hóskandi.

Hetta er eitt mál, ið eigur at vera ein læripengi hjá øllum, og Javnaðarflokkurin ger ivaleyst tað, ið gerast skal í einum slíkum máli. At farið ov harðliga fram vildi verið ein ólukku – tí tað hevði bert stuðlað undir tað serføroyska við fyri alt í verðini ikki at viðganga egnar feilir.

Fyrrverandi danski løgmálaráðharrin og fólkatingsformaðurin Erling Olsen, ið nú er givin vegna aldur, var einaferð sum løgmálaráðharri í hørðum andróðri í donsku fjølmiðlunum og í tí politiska umhvørvinum, viðvíkjandi eitt sera óheppið úttalilsi, ið kundi tulkast sum toleransa móti hashi. Erling Olsen fór í sjónvarpið og gav øllum borgarum eina treytaleysa umbering fyri sera óumhugsnu orð hansara. Journalisturin, ið spurdi, var kvikur at spyrja, um Erling Olsen ikki við hesum misti andlit. Erling Olsen svaraði líka skjótt aftur, at tað var púra rætt, at hann misti andlit, men at tað var betur at missa andlit, enn at missa høvdið.

Óhepna støðan sum formaður javnaðarfloksins kom sær sjálvum í ber ikki til at burturforklára og verður tað heldur ikki. Tað er sterkt av honum alment at hava verið frammi og ásannað mistakið. Men virðið og tyngdin í tí, sum hann segði hóskvøldið, valdast um, hvussu hetta fer at standa mát við atburðin og verkið í framtíðini.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Óli Breckmann blakar vælferð og mannalagnur í ruskposan!

Marjus Dam, løgtingsmaður

Munnu nógvir Fólkafloksveljarar ikki sita eftir í døpurhuga, nú vælferð føroyinga av politikki samgongunnar og Óla Breckmanns er blaka í ruskposan og loysingin saman við øktum skattum og uppsagnum er sett í hásæti.

Hópuppsagnir:

Kaldi gjósturin av loysingarpolitikkinum blæsir nú inn í hvørt heim í Føroyum. 8 uppsagnir sendar út ígjár til fólk á einum stovni. Skattur á plastikposar og børn. Mong fólk munnu neyvan tora í postkassan í hesum døgum, nú køldu fylgjurnar av byrjanini av loysingarpolitikkinum eru við at merkjast. Tí fráboða er, at lønarhækkingin á almenna arbeiðsmarknaðinum skal fíggjast við uppsagnum av fólkum, ið arbeiða á somu stovnum. Men øll mugu anda djúpt – tí hetta er bert byrjanin. Tað verður nógv nógv verri enn um samgongan sleppur at halda fram. Men hví søgdu teir onki um hetta áðrenn valið 2002? Er tað ikki at lumpa og lúgva fyri føroyinginum?

Óli Breckmann kann, eftir hvat sosialurin skrivar, ikki arbeiða saman við hvørki Sambandsflokkinum ella Javnaðarflokkinum – tí teirra tilverugrundarlag, eftir hansara tykki, er ríkisveitingin.

Vælferð:

Her fer Óli Breckmann so dyggiliga skeivt. Tilverugrundarlag Sambandsfloksins ígjøgnum meira enn hundrað ár er og verður vælferð føroyinga. Fyri at røkka hesum máli reka vit ein demokratiskan borgarligan liberalan, men sosialt rættvísan politikk, ið skal húsast væl við landsins virðum. Vit hava í hesi hundrað árini arbeitt saman við mongum flokkum á Føroya Løgtingi, ið hava sama mál. Vit tora væl at fara til eina fólkaatkvøðu um loysing, tí tað er tað einasta rætta at gera, um ein hevur fólkaræði í huga. Men tað tordi/torir Óli Breckmann ikki.

Føroyingar stuðla okkum so væl, at vit eru nógv tann størsti flokkurin. Og tað er eisini væl skiljandi.

Fyri at røkka okkara høga máli, vilja vit samstarva bæði við politiskar flokkar á Føroya Løgtingi, eins og við Danmark og onnur lond.

Skaðin nýtir okkum í hjarta:

Tí nýtir tað okkum í hjarta, at m.a. Óli Breckmann púra høpísleyst søplar part av ríkisveitingini, ið vit hava rætt til, burtur. Fyri síðan at ofra vælferðina og senda uppsagnir út í føroysk heim. Hetta er púra óneyðugt og er beinleiðis skaðligt fyri føroyingar. Tað vísir, at Óli og hansara líkar hava ofta vælferðina fyri loysing.

At Sambandsflokkurin, ið hevur vælferð føroyinga sum tilverugrundarlag ikki kann nýtast at samstarva við Fólkaflokkin, sambart Óla Breckmann, man fáa nógvar føroyingar at stúra. Tí hendingarnar í hesum døgum vísa greitt, at vælferðin og sosiala trygdin verður ofra fyri loysing. Teir hava gjørt Føroyar til eitt verri land at búgva í hjá fleiri bólkum her á landi.

Óli Breckmann skal vita eitt: Sambandsflokkurin er altíð klárur til samstarv við politiskar flokkar í Føroyum. Men okkara krav er og verður, at vælferð føroyinga verður sett í hásæti.

Fyri at røkka hesum stevnumiði má Óli Breckmann taka vælferðina úr aftur ruskposanum og seta hana í hásæti, eins og Sambandsflokkurin altí hevur gjørt. Og helst blaka loysingina í ruskposan — møguliga eftir at fólki hevur tala um hesi viðurskiftir á eini fólkaatkvøðu.

Loysing samgongunnar ger tað so kalt í føroyskum heimum, serliga tá kyniskar uppsagnir streyma inn — og hótta tilveruna hjá einstøku barnafamiljuni.

Sambandsflokkurin — ið setir vælferð føroyinga í hásæti, er alternativið til kyniska fiaskopolitikk Óla Breckmans.

Hugsjónir

Sjúrður Hansen, Gøtu

Sjálvandi. Hví sita her og gerast tungur í huga av at hugsa um politiska hugsjónir, visiónir, tá alt er so sera einfalt: At taka bommini frá børnunum. Vaknið, Jóannes, Annfinn, Nyrup, Fogh & Co. Og kanska Blair eisini: Politikkur er bomm.

Men tað var altso ikki tí, eg vildi hava javnaðarflokkin upp í samgonguna nú. Sí Sosialurin, No or never við breiðari semju, 6/8-03.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstaðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Meðan vit bíða

Lisbeth L. Petersen
Sambandsflokkurin

Høvdu ikki munnligir fyrispurningar verið á fundarskránni hjá løgtinginum mikudag, so sum tingskipanin loyvir, hevði fáur lagt til merkis, um nakar tingfundur yvirhøvur hevur verið.

Meðan vit í andstøðuni bíða, er samgongan í ferð við at gera uppskot til fíggjarlóg fyri 2004. Ikki landsstýrismaðurin og hansara fíggjarmálaráð, sum annars hevur verið vanliga mannagongdin, men samgonguflokkarnir, og samstundis tykist sum um fíggjarnevndarviðgerðin er byrjað, har bert meirilutin er umboðaður. Alt annað tykist liggja stilt, tí semja skal fáast og sparingar gerast, og embætisfólkini hava úr at gera.

Samstundis sigur landsstýrismaðurin við fíggjarmálum við tjóðveldisblaðið, at "Landskassin fløðir upp um lúkukarmin av pengum" og so skuldi alt verið so sára gott, ella hvussu ……?

• Men meðan vit bíða, boðar heimarøktin frá rættliga álvarsomum trupulleikum, tí játtanin røkkur ikki, og pengar eru ikki til røktina; skorið er longu inn á bein og møguleiki er ikki fyri at taka nýggjar brúkarar inn í skipanina, men landsstýrismaðurin er ikki nødgur, kritiserar og gevur harraboð, og vil hava meira virksemi fyri ongar pengar.

• Og meðan vit bíða, økjast trupulleikarnir í sjúkrahúsverkinum, har skurðlæknarnir ikki fáa arbeitt, sum teir annars vildu, tí sjúklingar kunnu ikki sendast heim sum ætlað aftaná viðgerð, av tí at heimarøktin ikki virkar, og nú eru ongar tómar sengur til teir sjúklingar, ið standa á bíðilista.

• Psykiatriska økið er forsømt, og bústaðartørvurin átrokandi og alsamt vaksandi hjá teim psykisk veiku og sjúku, og verandi umstøður hava fingið fleiri viðmerkingar frá okkara umboðsmanni.

Hesi eru bert nøkur fá dømi um, hvat hendir í føroyska samfelagnum í løtuni, har alt skuldi blíva so gott og trygt, tí nú skuldu vit sjálvi stýra og gjalda. Og meðan landsstýrismaðurin reypar av tí fulla landskassanum, har milliardir "standa á bók", leggur hann eykagjald omaná góðgæti og sodavatn, tí hetta er ósunnur kostur! Hevði endamálið so verið at oyramerkt eykagjaldið til bruk innan heilsupolitiska økið, t.d.við at lækka verandi mjólkaprísin, so kundi verið ein meining í tí, men so er ikki !

Eykaavgjald, sum skal í landskassan, skal leggjast á plastikkposar, og verður kallað "umhvørvisgjald".

Ongin kreppa ….

"Ongin kreppa er í væntu, alt slíkt tos er púra burturvið" sigur landsstýrismaðurin. Men tað sum hendir í løtuni minnir um tað, sum hendi, tá kreppan í nítiárunum tók seg upp, og pengar manglaðu allastaðni.

Tá fóru t.d. pengarnir í landskassan, sum drúgva nevndarálitið um broyttu rúsdrekkalógina annars segði, skuldi brúkast til viðgerð og fyribyrgjandi tiltøk burturav.

Tá kreppur taka seg upp, verða teir veikastu bólkarnir altið harðast og fyrst raktir, men meðan vit bíða eftir nýggja fíggjarlógaruppskotinum, boðar landsstýrismaðurin frá "at landskassin fløðir upp um lúkukarmin av pengum".

Soleiðis royndist verandi fíggjarlóg, ið vit í andstøðuni longu frá byrjan skírdu órealistiska, og soleiðis royndist henda samgongan!!

Hvør prædikar evangeliið? Rómbrævið 1:1

Christian Fróði Djurhuus

Vit kunnu ikki megna nógv meir, um vit hyggja til dømis eftir einum prædikara evangeliums, enn ápostulin Paulus. Í Rómbrævinum 1:1 kunnu vit síggja hvussu Gud Heilagi Andin íblásti henda serstaka mann til at lýsa sig sjálvan sum ein prædikara evangeliums. Við at gera hetta, ímyndar hann eisini allar teir menn, sum trúliga prædika evangelium Kristusar.

»Paulus, tænari Jesu Krists« Tann maður sum trúliga prædikar evangeliið, tann maður ið altíð prædikar evangeliið, tann maður sum prædikar hitt heila evangeliið og bara tað, er ein tænari Jesu Krists. Prædikarar evangeliums eru viligir, sjálvkravdir trælir Sonar Guds. Legg til merkis hvussu Paulus lýsur seg sjálvan. Tað er ikki Paulus prestur, Paulus doktari, faðir Paulus, ella Paulus pávi, men »Paulus, tænari Jesu Krists«, Hesin maður roknaði tað sum hin hægsta heiður at vera ein tænari Jesu Krists, ikki tænarin, men ein tænari. Hann var bert ein tænari millum mangar; men hann var ein tænari.

»Kallaður til ápostul« Orðið »ápostul« merkir í grundini »sendiboð.« Tað eru eingir menn í dag sum hava ápostólskt embæti. Men hóast tað, eru Guds tænarar Hansara sendiboð. Prædikarar evangeliums eru kallaðir og av Gudi evnaríkir til at vera Hansara sendiboð, menn sendir við einum boðskapi. Ein prædikari evangeliums er ein maður við einum boðskapi, einum boðskapi frá Gudi, einum boðskapi ið brennur í sál hansara, sum hann má bera víðari. Hann er ein maður við einum messianskum kalli, einum messianskum endamáli, eini messianskari heimild.

Legg til merkis: Um tú nakrantíð møtir einum manni við eini heimild frá Gudi, ella ein maður sum enntá hugsar at hann hevur eina heimild frá Gudi, nýtist tær ikki at undrast á tað. Tú fært at vita tað. Hann letur seg ikki forma, boyggja fyri trýsti, yvirgevur seg ikki, ger onga neyðsemju. Hví skuldi hann? Hann er ein heimild frá Gudi! Tað ger hann ovurhonds ótemjandi av nøkrum, uttan av Gudi, ið sendi hann. Móses hevði eina heimild frá Gudi. Ein og hvør, ið kom í samband við hann, vitsti tað. Jóhannes Doyparin hevði eina heimild frá Gudi. Tað var ikki ein maður ella kvinna ið nakrantíð fór út í oyðimørkina at hoyra hann prædika evangeliið, sum síðani kom aftur og ivaðist um hann var ella ikki var sannførdur um at Gud hevði kallað hann til verkið, sum hann gjørdi. Móses og Jóhannes vóru báðir djarvir sum leyvur tíat teir vitstu at teir vóru sendiboð hjá einum Alvaldum Gudi.

Hygg eftir versinum eina fer aftrat. Eg skal siga tær nakað annað um mannin, ið trúliga prædikar evangeliið. Hann er ein tænari Jesu Krists, ein guddómliga kallaður boðberi hjá Jesusi Kristi, og hann er »kosin til at kunngera evangelium Guds.« Tænarar Guds, sannir prædikarar evangeliums, eru menn sum eru kosnir til evangeliið. Teir taka ikki arbeiðið, at vera tænarar Guds, lættliga. Teir eru menn kosnir til evangeliið: Álagdir av Gudi ˆ (sum Jeremias og Paulus, við kalli Guds, við gávum Guds á teimum, og við Guds setan teirra í Hansara ríki. Teir eru eisini menn kosnir til evangeliið av teirra egna, altið vaksandi gudsótta og áseting (Rómbrævið 1:9-17). Tann maður, ið prædikar evangelium Kristusar, er eins og tænari Ábrahams, sum varð sendur til at fáa Ísaki, syni hansara, eina brúður. Hann vil ikki verða drigin frá arbeiði sínum, hvørki av njóting ella trýsti. Hvørki arbeiði ella byrða, familja ella vinir, fíggindar ella figging, stuttleiki ella lívsvandi vil venda einum slíkum manni avsíðis frá mikla verkinum, sum Gud hevur kallað hann til. Hann er »kosin til at kunngera evangelium Guds!«

Hvat kann gerast fyri at fáa:

Betri lag á arbeiðsmarknaðinum

Tíðindaskriv

Skipað verður fyri stórum almennum pallborðsfundi mánadagin 29. sept. 2003, kl. 19.30 í Útvarpshøllini um evnið:

Hvat kann gerast fyri at fáa betri lag á føroyska arbeiðsmarknaðinum ?

• viðvíkjandi ósemjum partanna millum í sáttmálaskeiðnum og undir sáttmálasamráðingum, og

• viðvíkjandi áliti og samskifti millum partarnar og við politisku myndugleikarnar fyri at menna ein framrættaðan arbeiðsmarknaðarpolitikk.

Sum øllum kunnugt eru nógvar og ymiskar meiningar um hesi viðurskiftini á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Landsstýrið hevur sent uppskot um arbeiðsrætt og nýggja semingslóg út til ummælis hjá þortunum. Arbeiðsgevarar vilja hava uppskotini samtykt sum skjótast. Løntakarafeløgini vilja ikki hoyra talan um arbeiðsrætt ella at lóggivið verður um nýggjar reglur á arbeiðsmarknaðinum, uttan at hetta hendur gjøgnum samráðingar millum allar partar. Politisku flokkarnir eru ójavnir á máli, men tað verða kortini teir sum skulu taka endaligu støðuna.

Pallborðsfundurin verður skipaður á heldur óvanligan hátt, har ið luttakararnar koma at sita í 3 ymiskum pallborðum, sum fara at seta spurningar og svara spurningum, áðrenn niðurstøður verða gjørdar. Endamálið er at fáa tey ymsu sjónarmiðini fram í stuttum og greiðum grundgevingum. Onki uttanumtos. Ongar langar og keðiligar røður. Leikluturin hjá frøðingunum báðum verður at royna at svara spurningum av løgfrøðiligum og búskaparfrøðiligum slag.

Luttakararnar verða:
Pallborð 1: Partarnir
• Løntakarar, arbeiðara feløg
• Løntakarar, starvsfólkafeløg
• Arbeiðsgevarar, privatir
• Arbeiðsgevarar, almennir

Pallborð 2: Frøðingar
• Advokatfelagið
• Búskaparráðið

Pallborð 3: Politikkarar
• Fólkaflokkurin, landstm.
• Javnaðarflokkurin
• Sambandsflokkurin
• Tjóðveldisflokkurin

Fundarstjóri verður Helgi Jacobsen, útvarpsmaður.
Ætlanin er eisini at fundarfólkið skal sleppa framat við nøkrum fáum stuttum spurningum til pallborðsluttakararnar.

Pallborðsfundurin er almennur, evnið er aktuelt og týdningarmikið, so vónandi verður áhugin stórur. Øll eru vælkomin.

Um tygum hava spurningar hesum viðvíkjandi, kunnu tygum venda tygum til undirritaða.

Vinarliga
Hans Pauli Strøm, flokksskrivari
Javnaðarflokkurin
350 Vestmanna
Tlf. 221919
hps@kallnet.fo